

www.oljan.fo

**Jan Müller** 04 - 11 - 2012

# Kinesiskur banki bjóðar Grønlandi 14 milliardir

Grønlendska landsstýrið er nú farið undir avgerandi samráðingar við ein almennan kinesiskan banka um at fíggja eina risastóra námsverkætlan nærhendis Nuuk. Sambært keldum hjá danska blaðnum Politiken er talan um kinesiska bankan China Development Bank, sum hoyrir undir stjórnina í Beijing, og hvørs endamál er at tryggja Kina atgongd til týðandi ráevni kring heimin. Sambært somu keldum er bankin sinnaður at leggja upp til 14 milliardir krónur í risaverkætlanina í Grønlandi, og umframt sjálvt jarnnámið skulu pengarnir brúkast til at gera eina útskipingarhavn og ein 150 kilometrar langan veg. Formliga er tað tað bretska felagið London Mining, sum stendur fyri verkætlanini, men felagið er ikki ført fyri at útvega fíggingina, og her er China Development Bank komin upp í verkætlanina. Málið er nú komið so mikið langt, at í næstu viku skal Ove Karl Berthelsen, landsstýrismaður í ráevnismálum, hava fund við umboð fyri tann kinesiska bankan um verkætlanina, skrivar Politiken. Tað váttar landsstýrismaðurin eisini fyri blaðnum. Kann elva til spenning Serfrøðingar í kinesiskum viðurskiftum eru ikki ovfarnir av, at tann almenni kinesiski bankin vísir áhuga fyri einari ráevnisverkætlan í Grønlandi. -Kina hevur ikki nóg mikið av ráevnum, og China Development Bank styðjar ætlanir, sum hava sum mál at útvega Kina atgongd til orku og tilfeingi, sigur siger Erica S. Downs á amerikanska Brookings-stovninum við danska blaðið. Men tann stóri hugurin hjá Kina at fáa fótin fastan í Grønlandi kann elva til stórpolitiskan spenning. Tað heldur í hvussu er fregnartænastan hjá donsku løgregluni, PET. Í einari nýggjari frágreiðing skrivar hon, at USA og Russland eru ikki serliga fegin um, at Kina roynir at fáa eftirlit við náttúrutilfeingi í tí arktiska økinum. Donsk misnøgd Fyrrverandi danski uttanríkisráðharrin Per Stig Møller fýltist herfyri á, at grønlendingar reka uttanríkispolitikk, hóast málsøkið framvegis er danskt. Í

Danska Fólkaflokkinum eru tey ikki fegin um, at grønlendska landsstýrið fer at tingast við kinesarar um atgongd til landsins náttúruríkidømi. Søren Espersen, framsøgumaður floksins í grønlendskum viðurskiftum, segði í gjár, at í einum so týdningarmiklum máli kunnu danir ikki sita hendur í favn. Hann hefti seg serliga við tosið um, at fleiri túsund kinesarar skulu til Grønlands at arbeiða í náminum fyri undirløn, men uggaði seg við, at enn umsita danskir myndugleikar uppihalds- og arbeiðsloyvi í Grønlandi.